# FCK leyvurnar lukta blóð




*Brian Laudrup hevur umboðað bæði Chelsea og FCK. Her sæst hann í dysti fyri Chelsea móti just FCK*

*Mynd: Polfoto*

**FÓTBÓLTUR** Týskvøldið verður størsti dysturin í søguni hjá FCK, tá Chelsea kemur á vitjan á áttindapartsfinaluni í Champions League. Fyri hálvum ári síðani hevði fáur tora at trú upp á ein FCK sigur, men nógv er broytt síðani tá og FCK tykist av álvara at hava ein møguleika

Tróndur Arge
Manchester

Tá ein góður fjórðingur var farin av Premier League spáddi Sosialurin saman við fleiri øðrum miðlum, at Chelsea fór at vinna Premier League. Tað var ongin slingur í valsinum, tá Chelsea ferð aftaná ferð við góðum spæli trumlaði alla mótstøðu umkoll. Tað hevur leingi verið kent, at Chelsea eigarin, Roman Abramovich, hevur serliga gott eyga á Champions League steypinum.

FCK gjørdi um sama mundi klárt at herja á í Champions League. Onki danskt lið hevði nakrantíð vunnið seg víðari úr bólkaspælinum og mótsøðuliðini vóru Barcelona, Panathinaikos og Ruben Kazan. Ein møtumikil uppgáva.

### Chelsea niðurtúrurin byrjar

Tíðliga í novembur tapur Chelsea á Anfield móti Liverpool og eina viku seinni vinnur Sunderland heili 3-0 á Stamford Bridge. Skjótt gerst greitt, at okkurt er gali í London liðnum. Ikki fyrr enn 29. desembur vinnur Chelsea aftur í Premier League. Roman Abramovich sær at okkurt má gerast og keypur Fernando Torres og David Luiz fyri áleið 700 milliónir tilsamans í januar. Men síðani keypini hevur Chelsea ikki vunnið og mátti lúta í FA Cup á heimavølli móti Everton í vikuskiftinum. Enskir miðlar halda, at vinnur Chelsea ikki á FCK, so er Carlo Ancelotti arbeiðsleysur.

### FCK ger um seg

Umvegis sigrar á BATE Borisov og norska Rosenborg, kom FCK í bólkaspæli í Champions League. Tað var torført at ímynda sær, at FCK skuldi koma víðari úr bólkinum, men í fyrsta dystinum vinnur FCK 1-0 á russisku meistarunum, Rubin Kazan. Næsti dysturin í bólkaspælinum gevur tekin um, at FCK væl kann koma víðari. Teir vinna 2-0 á útivølli móti Panathinaikos. FCK eru óheppnir at tapa 2-0 á Nou Camp móti Barcelona, meðan retur dysturin í Parkini endar við flottum javnleiki. Eftir tap í Russlandi vinnur FCK í Parkini móti Panathinaikos og tryggjaði sær víðari luttøku í Champions League og viðring frá fótbóltsevropa. FCK liggur eisini langt fremst í heimligu kappingini.

### Brakið í Parkini

Týskvøldið verður fyrri dysturin millum liðið í Parkini. Danska kappingin hevur ligið still síðani desembur og FCK er tí ikki í somu dystarvenjing sum Chelsea. Spurningurin er nú um tað er ein fyrimunur ella ein vansi. Meðan Chelsea síðani jólamánaðin hevur spælt nógvar harðar og slítandi dystir, so hevur FCK bara havt ein dyst at hugsa um. Tað eru ymiskar meiningar um tað, men Shakthar Doneskt prógvaði, at dystarvenjingin ikki er avgerandi fyri úrslitið. Teir hava eins og FCK ikki spælt síðani desembur, men teir megnaðu at vinna á AS Roma á útivølli og hava eina 3-2 leiðslu undan retur dystinum á heimavølli.

### Søgan talar fyri Chelsea

Meðan FCK viðhaldsfólk royna at spegla sær í Shakthar Doneskt, so nýtist Chelsea bara at opna søgubøkurnar fyri at finna góð ráð. Í 1999 hittust somu liðini í táverandi kappingini fyri steypavinnarar, Cup Winners Cup. Millum FCK leikararnar var okkara egni Todi Jónsson. Tá var eitt mál frá Brian Laudrup munurin á liðnum. Brian Laudrup skifti stutt eftir dystin frá Chelsea til júst FCK. Ein annar leikari, ið hevur umboðað bæði liðini, er Jesper Grønkjær, sum spælur við FCK. Hann spældi í Chelsea í tíðini tá Roman Abramovich keypti London felagið.. Søgan sigur, at hevði Jesper Grønkjær ikki skorað móti Liverpool í seinasta dystinum í 2002/2003 kappingarárinum og tryggja Chelsea luttøku í Champions League, so hevði Roman Abramovich ongantíð keypt Chelsea. So er spurningurin um sami Jesper Grønkjær nú skal seta kýlar í Champions League vónirnar hjá Chelsea og Roman Abramovich?

*trondur@sosialurin.fo*

# Arsenal í trupulleikum í grannauppgerð

**Fótbóltur er eitt løgið spæl. Í vikuni vann Arsenal á Barcelona, sum undan dystinum fekk heitið besta liðið í heiminum av Arsenal venjarinum, Arsené Wenger. Í vikuskiftinum megnaðu teir ikki at vinna á League One liðnum og grannunum úr Leyton Orient**

Tróndur Arge – Liverpool

Mikukvøldið skolaðu lovorðini omanyvir Arsenal og Arsené Wenger. Á Emirates leikvøllinum í London megnaðir Arsenal at koppa Barcelona. Ensku miðlarnir skrivaðu síðu upp og síðu niður um avrikið. Í gjár spældi Arsenal so í FA Cup steypakappingini móti Leyton Orient á útivølli. Hóast Champions League hevur flestu av bestu liðnum í heiminum, so eu tað fáar kappingar, ið standa mát við FA Cup tá tað kemur til óvæntað úrslit. Leygardagin mundi Manchester United ikki vunnið á Crawley Town, sum spælir í fimtbestu deildini í Onglandi.

Rætt skal verða rætt og hvørki Arsenal ella Manchester United spældu við sterkastu uppstilling. Tað gjørdi Manchester City móti Notts County og vunnu greiðan 5-0 sigur. Tað er ikki óhugsandi, at bæði Arsenal og Manchetser United høvdu vunnu stórt um spælt var við sterkastu uppstilling.

Arsenal kom eftir ætlan á odda, men tveir minuttir fyri tíð javnaði Leyton Orient. Venjarin hjá teimum segði eftir dystin, at málið kom júst í røttu løtu, tí nú hevði Arsené Wenger ikki møguleikan at skifta eitt nú Cesc Fabregas og aðrar menn inn at avgerða dystin.

Fyri bæði Leyton Orient, sum nú skal spæla umdystin á Emirates leikvøllinum, og Crawley Town høvdu dystirnir stóra fíggjarligan týdning. Fornmaðurin í Carwley Town sigur, at felagið fer helst at vinna áleið tíggju millionur krónur upp á dystin móti Manchester United.

Um Arsenal vinnur umdystin móti Leyton Orient, so skulu teir møta Manchester United á Old Trafford í fjórðingsfinaluni. Um ikki, so fara Leyton Orient óiva fegnir ein túr á Old Trafford.